tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Givið sær sjálvum misálit

## *Oddagrein*

MÁLIÐ um uppsagnirnar á Landssjúkrahúsinum fekk eina knappliga vend mánadagin, tá landsstýriskvinnan í heilsumálum, Helena Dam á Neystabø gjørdi bart og segði sjúkrahúsleiðaran á Landssjúkrahúsinum, úr starvinum - ella rættari gav til kennar, at hann fór at verða uppsagdur. Grundgevingin er illoyalitetur mótvegis politiska arbeiðsgevaranum, somu Helenu Dam á Neystabø. Síðani vit fingu nýggja stýrisskipanarlóg er tað fleiri ferðir hent, at landsstýrismenn hava sagt upp embætismenn, og eins og áður er spurningurin aftur frammi nú, um hesar uppsøgnir í veruleikanum eru „politiskar“, tvs. at landsstýrismenn fyri at bjarga egnum skinni lata egið tørvandi politiskt handalag ganga út yvir sínar embætismenn. Í aktuella sjúkrahúsmálinum er tað nú komið hartil, at sjúkrahúsleiðarin, Jákup Mørkøre hevur fingið sekkin, tí hann hevur ikki verið nóg loyalur móti sínum politiska arbeiðsgevara. Men sami Jákup Mørkøre letur í brævi, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, koma til sjóndar, at hann er einki minni enn eitt offur í einum politiskum leiki. Hann sigur, at hann hevur bert gjørt eftir boðum frá landsstýriskonuni og hennara aðalstýri, sum eisini hava verið vitandi um allar uppsøgnirnar og gongdina í málinum annars.

NÚ er sjálvandi ringt at siga, hvør sigur sætt í øllum hesum. Men vit meta kortini, at Helena Dam á Neystabø hevur verið undir so stórum trýsti frá løgmanni, at fekk Jákup Mørkøre ikki sekkin, so fór hon sjálv at verða uppsøgd. Og spurningurin er, um ikki landsstýriskonan átti at tikið avleiðingarnar av málinum og sagt seg úr starvinum. Tí Helena Dam á Neystabø veit - og tað veit hennara høgra hond í hennara egna aðalstýri, Høgni Joensen eisini - at sjúkrahúsmálið alt sum tað er er so eldfimt, at tað er nærum ómøguligt at fáa gjørt tingini nóg nøktandi. Ein skuldi trúð, náttúrlig avleiðing av, at embætismaðurin nú er uppsagdur, er, at nú verður alt at ganga strúkandi á sjúkrahúsøkinum, tí forðingar eru fyribeindar. Men soleiðis verður tað neyvan. Tí - og hetta hava vit gjørt vart við fleiri ferðir á hesum stað - tað finst ikki ein politiskur meiriluti í Føroyum, sum veruliga ynskir at bøta um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Væl kann tað vera, at játtanir eru hækkaðar, men samanumkemur og vit taka lønarhækkingar ol. uppí, so hevur gongdin verið tann sama øll seinastu árini: Landssjúkrahúsið er mishildið av politisku skipanini. Og tað er eisini greitt, at Helena Dam á Neystabø hevur ikki havt nógvar tjansir í Tinganesi at sannføra veruligu valdsharrarnar í landinum, løgmann og fíggjarmálaráðharran um týdningin av - nú landið hevur so stórt yvirskot - at kunna brúka part av tí til at menna Landssjúkrahúsið.

SØGAN endurtekur seg. Vit minnast, hvussu kontantur táverandi sjúkrahússtjórin Høgni Joensen var, tá hann alment boðaði frá avleiðingunum av skerdu játtanunum til sjúkrahúsøkið. Minnast vit rætt, so legði hann „kalt og kyniskt“ køldu tølini á borðið. Politiskar skerjingar vóru = 100 uppasagnir ella nakað í tann stíl. Og úrslitið var eitt gallróp frá politikarunum.Hvat bilti hesin embætismaðurin sær inn: Men hann gjørdi ikki annað enn at leggja veruleikan fram júst sum eftirmaður hansara JM hevur gjørt nú. Eingin ivi er um, at JM er vorðin syndabukkur í einum politiskum spæli, har starvið hjá Helenu Dam á Neystabø hekk í einum klønum tráð. Við uppsøgnini av JM hevur HDN givið sær sjálvum eitt misálit.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Hví er Hergeir so súrur?



Alla tað tíð, eg havi fylgt við í politikki, eini 30 ár, hevur tað verið samgongan, sum hevur staðið fyri skotum. Andstøðan hevur kritiserað og ført síni alternativu sjónarmið fram.

Hetta seinasta skeiðið hevur brotið frá. Tann størsti samgonguflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, hevur brúkt størsta partin av síni orku at hegla niður á Javnaðarflokkin. Hóast - ella kanska júst tí - at samgongan hevur brúk fyri okkum og ikki umvent. Skutilsveinar í Tjóðveldisflokkinum saman við Finni og Pálli, og tann síðsti í hesi lítið konstruktivu teggju er so Hergeir Nielsen, sum eisini ber prísin. Hansara skriving hevur so púrt onki við politikk at gera, bara útspilling (sí Sosialin leygardagin 15. jn.) Hon ber boð um ein djúpt frustreraðan mann. Og tí er skrivingin so desperat.

Eg kann heilsa Tjóðveldismonnum, at mótsett teirra flokki er ongin ósemja í Javnaðarflokkinum. Og so absolutt ongin ósemja um formannin. Flokkurin stendur samlaður aftan fyri Jóannes Eidesgaard, og tað er eisini galdandi fyri okkara fyrrverandi floksskrivara, sum skrivaði eina eggjandi og positiva grein. Men ilt eyga skal onki gott sjá. Og soleiðis við Hergeiri.

Onkur man hava spælt hund við Tjóðveldismonnum, hava teir fingið hatta burtur úr landsfundinum í Skopum. Javnaðarfólk meta hann sum besta fumd í mong ár. At Ole Stavad var við, er onki løgið í. Okkara hugsjón røkkur út um eingjargarðarnar, og vit hava altíð útlendskar gestir á landsfundi. Eisini úr Norra, Svøríki og Finlandi. Og J. Eidesgaard var á landsfundi hjá teimum svensku sosialdemokratunum í fjør. Tað er natúrligt fýri okkum, at partamenn hittast. Og kanska ikki bara fyri okkum. Høgni Hoydal var heiðursgestur á landsfundinum hjá kommunistunum í Íslandi í fjørheyst.

Ósemjan í Javnaðarflokkinum er eitt psykiskt fyribrigdi, ið bara finst millum oyruni á Hergeiri. Sjálvt Hergeir Nielsen mátti sæð, at hann undirmetir sínar lesarar, tá ið hann gevur andstøðuleiðaranum skyldina fyri, at hansara egna samgonga játtar ov fáar pengar til pensjonistarnar og til Suðuroyar Sjúkrahús.

Samgongan hjá Hergeiri megnaði at fella øll okkara broytingaruppskot við einum undantaki: Hóast harða mótstøðu frá samgonguni eydnaðist tað Javnaðarflokkinum og hansara monnum at bjarga Jóhonnu 600.000 kr., so hon kundi blíva verandi í Suðuroy. Ein herkin biti hjá tjóðveldismonnum í suðri.

Í skrivandi løtu sigur útvarpið, at landsstýrið leggur seinastu hond á samráðingaruppleggið til danir um fullveldið. Síðani skal tað í uttanlandsnevndina, har formaðurin skal fáa semju við m. a. Javnaðarflokkin. Tað ljóðar sum skemt. Tað mundi vera lagnunar speisemi, sum gjørdi, at Heirgar bleiv formaður, eftir at Jenis hevði givið Jóannes Eidesgaard judaskossin. Hergeir hevur óiva nógvar dygdir, men diplomatiskan hugburð mótvegis Javnaðarflokkinum og hansara formanni, kann valla nakar skuldseta hann fyri.

Hergeir og co. hava skyldina fyri ruðuleikanum við pensjónunum, hansara samgonga hevur skyldina fyri ruðuleikanum á Landssjúkrahúsinum, og hansara samgonga hevur ábyrgdina av teimum hóttandi uppsagnunum á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Nógv bendir á, at Javnaðarflokkurin fær sín triðja mann valdan í Suðuroynni. Og sær maður sítt egna mandat rilla undir sær, so er desperatiónin kanska forstáilig, men tað verður altíð ein ótýdlig sjón at síggja mann nekta seg sjálvan alment.

**Dan R Petersen.**

Tragikomiskt, at júst ein Tjóðveldismaður viðger leiðsluna í Javnaðarflokkinum, men ongin er fullspottaður, fyrr enn hann spottar seg sjálvan. Mótsett øðrum flokki so hevur Javnaðarflokkurin ongantíð haft áneyðir at krógva sín formann, meðan floksfelagar hava spælt kong gularót.

**D. R. P.**

# Sláið Ring havt aðalfund

Aðalfundurin hjá Sláið Ring var leygardagin 20. november 1999 á Landsbókasavninum.

16 dansifeløg kring landið við tilsamans úti við 2000 limum eru limir í landsfelagnum. Á aðalfundi kunnu allir limir í dansifeløgunum møta, men tað er bert ein umboðsráðslimur fyri hvørt dansifelag, sum hevur atkvøðurætt. Endamálið hjá Sláið Ring er at røkja áhugamálini hjá teimum 16 dansifeløgunum og í øllum at bøta um korini hjá tí føroyska dansinum.

Úr gerðabókini kann nevnast ymiskt, sum lýsir virksemið hjá landsfelagnum um farna árið:

Veittur varð stuðul til at feløg dansa saman, kvæðabókaútgávu, sjónbandsupptøkur av barnadansi, undirvísingartilfar og dansiferðir innan- og uttanlands.

Sláið Ring skipaði fyri dansinátt í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 17. juli. Nevndin fer at leggja heimasíðuna hjá Sláið Ring út á internetið. Aftaná kunnu dansifeløgini sjálv gera sínar heimasíður í tilknýti til hesa.

Í sambandi við 1000 ára haldið fyri kristniboðanina verður dansað ymsastaðni kring landið, har sum tiltøk verða.

Sláið Ring er í ferð við at skipa fyri eini stórari dansistevnu fyrst í juli mánaði ár 2002, nevnd Havleikur. Ætlanin er at bjóða dansarum úr øllum grannalondunum higar at vitja.

Ein hugskotsbólkur situr og arbeiðir við nýggjum tiltøkum, sum fata um tann føroyska dansin.

Sláið Ring er við í Nordleik, sum er norðurlendski felagskapurin fyri fólkadansarar. Sigast skal frá, at næsta Nordleikstevna verður í Stavanger 4.-9. juli komandi, og væntandi fara um stórthundrað dansarar av stað, bæði eldri og ungdómur yvir 14 ár. Um onkur hevur hug at fara við, kunnu tey tosa við dansifeløgini.

Nevndin hevur skipað seg: Rasmus Joensen í dansifelagnum Tøkum Lætt í Havn er formaður, Ketty Andreasen úr Tvøroyrar Dansifelag er kassameistari og Regin Debess úr Eysturoyar Dansifelag er næstformaður og skrivari.

Sláið Ring takkar í tíðindaskrivi fyri gott samstarv í farna ári og ynskir øllum eitt gott nýggjár - og ein góðan dansivetur.

# Samband um sundið sum skjótast

Hervið verður heitt inniliga á háttvirda Føroya Løgting, um at taka undir við fyriliggjandi lógaruppskoti.

Vit eru sannførd um, at verður hetta lógaruppskot samtykt, verður fasta sambandið um Vestmannasund ein veruleiki, og kann takast í nýtslu um 3-4 ár.

Verður lógaruppskotið hinvegin felt á Føroya Løgtingi kemur verkætlanin at draga út, til óbótaligan skaða fyri okkum, sum búgva og virka í Vágum.

Arbeiði byrjaði í 1988, men steðgaði tíverri stutt eftir. Vit hava nú tolið bíðað í meira enn 11 ár eftir, at arbeiðið skal verða uppaftúrtikið.

Skulu vit nú bíða í 10 ár afturat eftir einum føstum sambandi um Vestmannasund, kemur hetta at føra við sær ein sváran skaða fyri alla Vágoynna.

Verandi neyðloysnir á ferjusambandinum eru ótíðarhóskandi, og virka sum ein fløskuhálsur fyri allari menning av Vágoynni. Tí er alneyðugt at tað nýggja fasta sambandið um sundið kann takast í nýtslu sum skjótast.

**Við hávirðing**
**Vegna**
**Felagskommununa í**
**Vágum**

Rósa Samuelsen, Sandavágur, Durita Jacobsen, Miðvágur, Eivin Jacobsen, Sørvágur og Gutti Guttesen, Bøur.

## Lindin sendir fríggjadagin

Hin triðja føroyska útvarpsstøðin fer at senda fríggjadagin. Talan er um kristiliga kringvarpið, Lindina, sum í fleiri mánaðir hevur fyrireikað seg at senda. Talan verður um andaligt tilfar.




